## ÚT AT KOYRA

## Mazda 323 F



Mazda 323 F kemur nú á marknaðin í eini nýggjari útgávu, sum fæst við 2.0 litur motori við 130 hk, og eini VICS (Varieble Inertia Charging System) skipan, sum styrkir innsúgvingareffektina og gevur betri snúningsmoment.

*Kelda: Motor Magasinet*

## Nýggjur Vectra í heyst



Ein nýggjur Opel Vectra verður ein av stóru nýggjheitunum á bilaframsýningunum í heyst. Designi verður ein blanding av núverandi Vectra og Astra. Í fyrstu syftu kemur hann við 4 og 5 hurðum, og stationvognurin kemur eitt ár seinni.

*Kelda: FDM / Motor*

# Mercedes-Benz CLK 320 - luksusbilur í milliónaklassanum

**Tað er ikki á hvørjum degi at vit síggja spildurnýggjar bilar, í tí dýra luksusklassanum við føroyskum nummarplátum. Men nú ein dagin kom ein Mercedes-Benz CLK 320 til landið.**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Tá Hans Jacob Kollsker, sum eigur og rekur plátu og lakkeringsverkstaðin, "Bilverkstaðið v/ H. J. Kollsker" í Slættanesgøtu í Havn, var í páskafrí í Týsklandi, leitaði hann sær eftir einum Mercedes luksusbili. Úrslitið var at tað eydnaðist at fáa ein silvurgráan Mercedes-Benz CLK 320 við hvítum leðursetrum og hópin av eykaútgerð. Hetta er ein bilur sum kostar umleið kr. 800.000,- her hjá okkum, og yvir eina millión í Danmark.



*Hans Jacob Kollsker við nýggja Mercedes CLK bilinum*

### Hópin av útgerð

Bilurin er so væl útgjørdur, at vit ikki kunnu nevna alt, men hann hevur til dømis Parktronic, sum sigur frá um bilurin kemur ov nær, tá hann verður parkeraður. Setrini farmman, sum kunnu stillast elektriskt á allar hugsandi mátar, hava memory funktión, soleiðis at tey sum vanliga koyra við bilinum, kunnu við at trýsta á ein knøtt, fáa setrið at stilla seg sjálvt inn til teirra. Telefonin er innbygd í gardanboksina, og á instrumentbrettinum sæst hvør tað er sum hevur ringt. Man tekur telefonina, ella leggur á við at trýsta á knøttar á rattinum. Eisini hevur bilurin eitt gott Bose-anlegg við 8 hátalarum, regnsensorar til viskararnar, og elsóltak.

At koyra bilin er ein uppliving fyri seg. Ljóðið frá V6 motorinum, kraftyvirskotið og koyrieginleikarnir, saman við Tip Tronic automat. gearkassanum, gera bilin til nakað heilt serligt.



### Mercedes-Benz CLK 320

| | |
|---|---|
| **Motorurin:** | 3,2 litur V6 218 hk |
| **0-100 km/t:** | 7,4 sek |
| **Toppferð:** | 240 km/t |
| **Bensinnýtsla:** | 9,9 km/l |
| **Dekkstødd:** | Framman: 205/55-16, aftan: 225/50-16 |
| **Stødd og vekt:** | Longd: 457 cm, Breidd: 172 cm, Hædd. 139 cm, Eginvekt: 1495 kg, Viðførisrúm: 420 litrar |




**CITROËN ZX 1.4I IMAGE 5/H**
Árg mar.96, Km 83.500. Kr. 85.000.



**CITROËN XANTIA 1.9 TD STW**
Árg mar.96, Km 85.500. Kr. 119.000.



**PEUGEOT 106 DIESEL**
Árg jul.95, Km 117.500. Kr. 59.000.



**MITSUBISHI COLT 1.6 GLX 3/H**
Árg mai.97, Km 84.500. Kr. 105.000.



**MAZDA 323 1.3 4/H**
Árg 2000, Km 18.000. Kr. 130.000.



**BMW 318 TDS COMPACT**
Árg apr.96, Km 44.300. Kr. 160.000.



**MITSUBISHI GALANT 2.0 GLSI**
Árg jun.91, Km 186.500. 5/h. Kr. 85.000.



**NISSAN PRIMERA 2.0 SLX 4/H**
Árg aug.97, Km 25.000. Kr. 139.000.



**TOYOTA CARINA E TD**
Árg nov.96, Km 125.000. Kr. 120.000.



**MITSUBISHI L300 2.5 TD 4X4**
Árg mai.96, Km 140.000. Kr. 120.000.



**MITSUBISHI LANCER 1.5 EXE**
Árg jun.92, Km 118.000. Kr. 65.000.



**MITSUBISHI LANCER 1.5 EXE**
Árg 89, Km 203.000. Kr. 15.000.

**CITROËN BX 1.6 SELECTION 5/H**
Árg aug.92, Km 55.000. Kr. 60.000.

**RENAULT MEGANE 1.4E**
Árg jul.98, Km 36.500. Kr. 109.000.

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
**Ivan Johansen Bilar**
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo




# Dómsnevndin tekur støðu til niðurflytingina

**Dómsnevndin hjá Hondbóltssambandin um fór týskvøldið undir viðgerðina av málinum um niðurflyting úr bestu kvinnudeildini**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sum kunnugt tók trætumál seg upp, tá seinasta leikumfar í hondbóltskappingini hjá bestu kvinnudeildini hevði verið. Stóri spurningurin tóktist vera, hvørt tað skuldi verða Tjaldur ella Sóljan, sum komandi kappingarárið skal spæla hondbólt í aðru deild.

Á stigatalvuni høvdu bæði liðini sama stigatal, meðan málmunurin hjá Tjaldri var munandi betri enn tann hjá Sóljuni, og tí hildu tær á Skálafjørðinum seg hava vunnið rættin til enn eitt leikár í bestu deildini.



*Hóast hondbóltskappingin var liðug fyri einum mánaði síðani, er dysturin millum Tjaldur og Sóljuni enn ikki liðugt leiktur*

### Møttu ikki

Kjarnan í málinum er dysturin, sum Tjaldur skuldi spæla móti VB í grundspælinum. Sama morgun, sum dysturin skuldi spælast, gav Tjaldur avboð til dystin, tí tær hildu veðrið vera somikið vánaligt, at tað ikki var ráðiligt at fara suður.

Fyri fyrst varð dysturin útsettur, men tá nýggjur dystur ongan tíð kom á skránna, tók kappingarnevndin avgerð um, at VB skuldi vinna uttan dyst.

Síðani hoyrdist millum lítið og einki til hetta mál. Ikki fyrr enn á seinast leikumfari kom aftur rok í, eftir at Sóljan og Tjaldur høvdu leikt seinasta dystin sínámillum. Sigurin hjá Sóljuni í hesum dysti viðførdi, at tær komu ájavnt Tjaldrinum í stigum, og fagnaðurin var stórur í Vágunum. Tey hildu seg til grein 7.7 í kappingarreglunum, har ásett er, at um lið ikki er møtt til dyst í kappingarárinum, verður hetta galdandi fram um málmunin.

### Góðtóku ikki avgerðina

Ein skuldi so hildið, at støðan í málinum var púra greið, men Tjaldur vildi als ikki góðtaka hesa tulkingina. Tey siga seg ongan tíð hava fingið boð frá HSF um, at liðið noyddist úr deildini, um talan var um javnstøðu í stigum. Eisini varð ført fram, at tað ikki var fyrr enn tey lósu tað í fjølmiðlunum, at tey vistu av, at tey vóru dømd at tapa dystin.

At Tjaldur so eisini hevur gjørt sáttmála við fleiri leikarar, umframt venjaran, til komandi kappingarár, ger sjálvsagt ikki støðu teirra betri. Snøgt sagt er talan um eina katastrofu fyri felagið, um niðurflytingin til aðru deild verður veruleiki, og tí gjørdu tey alt fyri eitt av at kæra málið um niðurflyting til kappingarnevninda.

### Dómsnevndin tekur avgerðina

Kappingarnevndin vísti tá málið frá sær, vísandi til grein 7.7, og Tjaldur gjørdi tá alt fyri eitt av at kæra málið til dómsnevndina.

Dómsnevndin hevði týskvøldið fund um málið, men Niels Nattestad, formaður, sigur við Sosialin, at enn er eingin avgerð tikin í málinum.

- Út frá teimum upplýsingum, sum vit í løtuni hava um málið, kunnu vit ikki taka nakra avgerð. Vit hava í løtuni bert kæruna frá Tjaldrinum at taka støðu út frá, og tí hava vit biðji kappingarnevndina um fleiri upplýsingar, sigur Niels Nattestad.

Spurdur, hvussu long tíð fer at ganga, áðrenn dómsnevndin hevur tikið støðu í málinum, sigur Niels, at hann vónar ikki, at hetta fer at taka meira enn eina góða viku.

Umframt Niels Nattestad eru Jógvan Elias Winther Poulsen og Øssur av Steinum í dómsnevndini hjá HSF.

# Fótbóltsdystur og bilaframsýning

**HB fer fríggjadagin undir nýskapandi bilaframsýning í samband við heimadystin móti GÍ**

FÓTBÓLTUR&BILAR
*Jákup Mørk*

Sum ein roynd at skapa meira undirhald í samband við heimadystir sínar, hevur HB nú gjørt avtalu við bilasølur, soleiðis at hesar sleppa at hava framsýningar undir heimadystunum hjá HB.

Fyrstu ferð hetta verður roynt verður fríggjadagin, dýra biðidag, tá HB á heimavølli tekur ímóti GÍ.

Birgir Enghamar, formaður í HB, sigur við Sosialin, at ætlanin við hesum fyrst og fremst er at skapa meira lív kring heimadystirnar hjá besta mansliðnum.

Hann greiðir frá, at framsýningin er skipað soleiðis, at fýra bilar frá Meinhard Arge verða sýndir fram undir dystinum. Tveir við syðra enda av ovara vølli og tveir ímillum HB- og B36-húsið.

### Rulla inn í hálvleikinum

Í hálvleikinum verða bilarnir so rullaðir inn á vøllin, og tá fer stadion-varparin at greiða eitt sindur frá bilunum. Hvørja útgerð teir hava, hvat teir kosta o.s.fr.

Sum nevnt, er hetta fyrsta ferð, at HB roynir seg við slíkum tiltaki, men formaðurin ivast ikki í, at hetta er nakað, sum kann gerast fastur táttur til heimadystir felagsins.

- Vit síggja í øllum førum hetta sum eitt spennandi høvi hjá bilasølum at sýna vørur sínar fram, sigur Birgir Engamar, sum annars leggur dent á, at allar bilasølur eru vælkomnar at venda sær til felagið hesum viðvíkjandi.

Víðari sigur hann, at ætlanin er at hava slíka framsýning allar teir átta heimadystirnar, sum felagið hevur eftir í ár. Higar til er avtala gjørd við tríggjar bilasølur, og verður tann fyrsta altso Meinhard Arge, sum fer at sýna fýra Opel-bilar fram fríggjadagin.

*Formaðurin í HB vónar, at bilaframsýning verður ein fastur táttur til heimadystirnar hjá HB*

